# Ársfrágreiðing 2007 – 2008
# Nólsoyar skúlastýrið

**Virðisgrundarlag skúlans**
Uppskot til virðisgrundarlag skúlans og yvirlit yvir atburðarreglur er liðugt, men verður endurskoða nú nýggj leiðsla er í skúlanum.

**Framhaldsdeildin**
Samskifti hevur verið um hvørt tíðin er farin frá at hava framhaldsdeild í Nólsoy.

Framhaldsdeildin er ein royndarskipan, sum hevur verið í gildið í nærum 20 ár. Hóast nógv gott er spurst burturúr, so hevur verið tungt at havt framhaldsdeild, tí Mentamálaráðið letur tímar til 8. og 9. flokk samsvarandi næmingatalið. Tímatalið hevur tí ikki verið nøktandi og neyðugt hevur verið at skarvað av tímunum hjá teimum yngru og lagt 7. flokk saman við framhaldsdeildini.

Foreldrafundur hevur verið um støðuna, men ongin greiður meirilutur var fyri hvørt framheildsdeildin skuldi halda fram ella setast úr gildi.

Skúlastýrið metir, at tíðin er farin frá framheildsdeildini og at næmingarnir fáa fleiri avbjóðingar fakligt og sosialt í størri skúla. Tí hevur skúlastýrið hetta skeiðið heitt á Mentamálaráðið at seta úr gildi royndarskipanina. Ynskið er gingið á møti og sostatt er Nólsoyar skúli nú ein tveystreingjaður skúli við flokkum frá 1. til 7. skúlaár. Hetta merkir, at tað komandi skúlaár fara at vera 2 skúlabólkar.

Næmingunum, sum fara í 8. og 9. flokk, stóð í boði at halda fram í framheildsdeild í Nólsoy, men tey hava øll valt at taka skúlaárið í Havn.

**Nútímansgerð og dagføring av Nólsoyar skúla**
Mentanardeild Tórshavnar kommunu er sent áheitan at dagføra skúlabygningin, so høll, køkur, tónleikastova, serstova, vátrúm, bókasavnshøli, skrivstova, inngongd og matarhøll vera á skúlanum í hóskandi stødd. Eisini er ynskiligt at fáa telduatgongd um allan skúlan.
Nýggi fyrstilærarin hevur stovnað heimasíðu www.skulin.fo/NOL, ið fyrst verður til praktiska upplýsing og síðani eftir orku verður útbygd - hetta sum liður í talgildum skúla eisini við umhvørvinum fyri eyga - men fyrst og fremst soleiðis at foreldur og børn altíð eru kunnað um virksemi skúlans.

**Uttanduraumhvørvið**
Arbeitt verður framhaldandi við málinum.
Næmingarnir og lærararnir hava gjørt uppskot - og okkurt er samanteknað. Málið hevur longu verið til viðgerðar á lærarafundi í august og samskifti er við býráðið.

**Ritusamband**
Skúlastýrið hevur heitt á Helenu Dam á Neystabø, landsstýriskvinnu, og Heðin Mortensen, borgarstjóra, at arbeiða fyri rutusamband kl. 15 til skúlabørn, sum ganga í skúla í Havn og skulu heim aftur til Nólsoyar.

**Tiltak um trivnað saman við dagstovninum ”Látrið”**
Fruktabært felags tiltak var við foreldur og starvsfólk á dagstovninum. Anna Dalsgaard, trivnaðarráðgevi, skipaði fyri einum góðum og áhugaverdum kvøldi.
Nýggi leiðarin í Látrinum og nýggi fyrstilærarin hava samskift og fara at finna ymsar samstarvsmøguleikar

**10. flokkur**
Býráðið heitti á skúlastýrini í kommuni um at koma við hugskotum til eina broyting av 10. flokk. Nólsoyar skúli viðmælti eina liðiliga loysn við nógvum upplivilsum – eisini longdari praktikk – og at 10. skuldi savnast á einum stað.

Býráðið hevur avgjørt, at frá 2010 verða 10. flokkarnir savnaðir í einara lon í Eysturskúlanum og fara at hava sín egna bygnað og umsiting.

**Heim og skúli**
Felagsskapurin er stovnaður undir mottoinum:

"Foreldrini eru fyrstu og fremstu lærararnir hjá barninum".

Felagið er áhugafelag hjá føroyskum foreldrum at skúlabørnum og er áhugafelag hjá foreldraumboðunum í øllum skúlastýrum og hevur gjørt vart við seg í tí almenna kjakinum.

Foreldraumboðini hava luttikið á aðalfundi og fingið kunning um trivnaðarátøk.

**Móttøka**
Gunnvør Joensen og Hilmar Joensen hava havt teirra síðsta skúladag í Nólsoyar skúla, sum ávikavíst 1. lærari og lærari. Skúlastýrið saman við lærarum skúlans skipaði fyri móttøku í skúlanum hósdagin 24 juni kl 17 – 19. Nógv skúlabørn, núverandi og "gomul" saman við teirra familjum og bygdafólk annars nýttu høvi at støkka inn á gólvið at heilsa uppá. Skráin var hendan:

- Joan Sørinardóttir bjóðaði vælkomin og hugleiddi um Gunnvør og Hilmar og teirra námsfrøðiliga og listarliga virksemi fyri skúlan og bygdarlívið
- Børn undir leiðslu av Hilmar Joensen sungu og handaðu Gunnvør og Hilmar gávu og persónligar heilsanir
- Heðin Mortensen, borgarstjórin, helt røðu og handaði málning sum gávu frá býráðnum
- Bára Traustardóttir helt vegna lærararnar røðu og handaði gávu
- Gunnvør og Hilmar hildu takkarrøðu

Jóhanna Joensen stóð fyri trakteringini og fekk nógv rós fyri heimabakaða breyðið og drýlin við føroyskum viðskera. Til børnini vóru pitsasniglar.

Við festligum og hugnaligum klavertónum setti Charles Gade dám á tiltakið.

**Nýggjur 1. lærari**
Mentamálaráðið lýsti í mai eftir nýggjum 1. lærara. Jákup av Skarði er settur í starvið og honum verður ynskt til lukku og góða eydnu við starvinum.

**At enda**

Hetta er í stórum tað, sum skúlastýrið hevur arbeitt við hetta skúlaárið, men mint verður á, at gerðabók skúlastýrisins altíð er atkomilig hjá øllum foreldrum, um áhugi er til tað.
Ársfrágreiðingin verður send øllum foreldrum, og verða foreldur boðin í skúlan fyrst í komandi skúlaárið, har virksemi skúlans og ársfrágreiðingin verða umrødd. Sum fráboðað í brævinum børnini fingu fyri skúlabyrjan, verður fyrsti felagsfundur mánakvøldið 8. sept. 2008 kl. 19:30 til 21:30.

Við vón um gott samstarv

vegna skúlastýrið

Joan Sørinardóttir, forkvinna